VALGREINAR

Alivinna

Sverre Midjord
Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Viðvíkjandi alivinnuni, vil Javnaðarflokkurin arbeiða fyri, at hon fær væl betur karmar at arbeiða undir. Við at loyva útlendskum íleggjarum framat á t.d. aliøkinum, fáa vit eisini styrkt um avleidda virksemið, so sum veiting av vørum og tænastum og víðari virkan til dýraru vørur. Tó má ein treyt vera, at útlendsku íleggjararnir á ein ella annan hátt vera integreraðir í føroyska samfelagið, á sama hátt, sum treytirnar eru fyri at fáa leitiloyvi í oljuvinnuni. Hetta var ikki illa móttikið av oljufeløgunum, og verður neyvan vrakað av íleggjarum innan fiskaídnað, tí ein ílegging verður gjørd fyri at geva pengar av sær. Og ein vælvirkandi alivinna vil aftur geva pening í lands- og kommunukassar.

Tann einliga mamman!

Rúni Poulsen
Valevni javnarflokkin Eysturoy

Ein ung kvinna eg tosaði við fyri stuttum, kærdi sína neyð fyri mær, og spurdi meg um hvat Javnaðarflokkurin kundi gera fyri einligar mammur ið vóru arbeiðsleysar. Hon hevði fingið játtað pening frá almannastovuni, og kundi vera heima saman við barni sínum og fáa pening, einasta treyt var at hon av og á vísti skrivligt, at hon søkti um arbeiði, men arbeiði var einki at fáa, so hon helt hon skuldi fara á skúla, tí hon tímdi ikki bara sita inni allan dagin og bara fáa peningin serveraðan, men tá hon segði Almannastovuni um hetta so var eingin góða mamma, hon fekk ongan pening frá teimum, so hon mátti fáa pening frá Stuðulstovninum, men líka yvir 3000kr, kemur man ikki langan veg við, tá ein skal hava íbúð, barn, mat og skúlabøkur. Tað keðiliga í hesu støðuni er, at um hon ikki hevði sagt nakað fyri Almannastovuni, so hevði hon frítt kunnað lisið í eitt ár, bert víst at hon søkti arbeiði og fekk avslag frá arbeiðsplássum, og hevði Almannastovan goldið fyri alt uttan at vita tað. Synd at tey erligu ikki kunnu fáa tað betur í samfelagnum!

Hvussu kann samfelagið fungera, tá tey sum vilja nakað við lívinum fáa noktað pening at liva fyri? Nógv geva teimum sum einki gera skyldina, men tað er ikki rætt, tað skal bara so nógv broytast fyri at fáa hetta samfelagið at virka meira rættvíst. Javnaðarflokkurin fer at gera sitt til at „allar ungar mammur" sleppa at fáa eina útbúgving uttan at skulu vera bangnar um fíggjarligu korini.

Ein Positiv javanaðarrødd

Helena Dam á Neystabø
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Javnaðarhugsjónin er positiv. Hon hevur lagt lunnar undir tí vælferðarsamfelgi, sum øll í dag meta er tann besta samfelagsskipanin yvirhøvur. Tí má eisini boðskapurin vera positivur opin og framskygdur.

Til hetta løgtingsvalið er tað avgerandi, at tað vera optimistiskar javnaðarrøddir, sum bera fram ætlanir um samfelagsligar ábøtur, ið hava til endamáls at:

- gera Føroyar meiri fjøltáttaðar
- at vit gerast dugnaligari til at framleiða og skapa virðir burturúr føroyskum tilfeingi,
- at ágóðar og byrðar verða býttar »so javnt millum føroyingar« sum gjørligt.

Stutt sagt økja um búskaparliga rásarúmið, og fyribyrgja tí mannamuni og klassamuni, sum lættliga kann vaksa, tá útlit eru til búskaparliga truplari tíðir.

Eisini í tjóðskaparmálinum hevur Javnaðarflokkurin eitt ítøkiligt semjusøkjandi uppskot at byggja á, eitt uppskot sum tekur støði í sjálvsavgerðarrætti føroyinga, og sum varðveitir hendan týdningarmikla rætt. Eitt haldgott grundarlag undir teirri tjóðskaparligu semjuni, sum øll leingjast eftir.

Tjóðskaparliga semjan

Rasmus Niclasen
valevni Javnaðarfloksins í Vágum

Javnaðarflokkurin hevur ta greiðu fatan, at eitthvørt stig, ið verður tikið á sjálvstýrisleið, má byggja á breiðar semjur. Tað má byggja á felags mið og mál fyri alla tjóðina og flokkarnar.

Hesi síðstu 6 árini hava prógvað, at ongi úrslit hava í alt ov stóran mun sett dagsskránna. Eftir hvørt miseydnað samráðingarumfar við danir varð kósin bara snara eitt sindur, og so herjaða teir á til næsta fund, uttan stev og uttan mál.

Heimastýrislógin hevur roynst okkum væl í meir enn eina hálva øld, men tíðin er komin til broytingar. Greiða má fáast á valds- og ábyrgdarbýtinum millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Á grundlógarstevnuni var semja um, at Føroyar kann skipa seg í samveldi, um tað er tað, ið fólkið ynskir og áhaldandi vísir á tað.

Sjálvsavgerðarrætturin er tí ómissandi, so longi Føroya fólk og Føroya land eru til. Tí vilja vit hava ein sjálvstýrissáttmála, ið staðfestir føroyingar sum tjóð og Føroyar sum eitt land við sjálvsavgerðarrætti.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at savna flokkarnar á tingi í sjálvstýrismálinum, soleiðis, at leiðin vit velja at ganga

Viðmerking til grein í Dimmu 10. januar "Frá heimahjálp til onga hjálp" hjá Eddie Joensen, valevni Javnaðarfloksins í Norðurstreymi

Niklái Petersen
løgtingsmaður, valevni Tjóðveldisfloksins í Norðstreymoy

Eddie skrivar at fyri fyrstu ferð í 30 ár í allarbestu tíðum, hava vit fingið bíðilistar í heimarøktini av berari vanstýring, og at fíggjarmálaráðharrin hevur latið miðfyrisitingina vaksið við útvið hundrað milliónum kr.

Samdur við Eddie í at eldrarøkt eigur at vera ein rættur hjá fólki, líka so væl sum barnaansingin er blivin tað í nærmast øllum landinum, við tjóðveldisflokkinum í landstýrinum.

Víðari sigur Eddie, at okkurt valevnið hjá tjóðveldisflokkinum tosar um at seta kós, og at hon er so skeiv, sum hon kann verða.

Tjóðveldisflokkurin raðfestir eldraøkið rættuliga ovarlaga í sínum politikki, og er játtanin til eldraøkið hækka úr 164 mió.kr. í 2000 til 228 mió.kr í 2004, altso ein hækking uppá 64 mió.kr.

Trupulleikarnir hava verið í heimarøktini seinastu árini, játtanin til sjálva heimarøktina er hækka úr góðum 67 mió. kr í 2000 til 102 mió. kr. í 2004, altso ein hækking uppá 35 mió. kr. til sjálva heimarøktina, men tað sær tíverri ikki út til, at hækkingin er komin brúkarunum til góðar.

Tjóðveldisflokkurin hevur bert umsitið hetta økið í 18 mánaðir, hetta er eitt tungt og fløkt økið, og trupuleikarnir loysast ikki í eini handavending.

Vit hava slóðað fyri soleiðis, at komandi árini verða bygd 123 nýggj ellis- og røktarheimspláss, hesi eru játtaði og eru farin í gerð, og vit eru klárir við 60 plássum afturat um játtan fæst fyri hesum.

Samdøgursrøkt og økisterapi er eisini sett í verk, sum ein partur av heimarøktini. So at siga at tjóðveldisflokkurin onga kós hevur í hesum máli, er heilt burturvið.

Javnaðarflokkurin hevur umsitið hetta mál mest sum øll árini fram til 2002, og har mugu vit bara staðfesta, at lítið og onki er hent á hesum økið, teimum eldru til frama og sóma.

Annars haldi eg tað, at tílik mál eiga at kunnu loysast tvørtur um floksmørk, og ikki brúkast sum politisk kastibløka upp undir val, tey eldru hava betur uppiborið.

Viðvíkjandi økingini í miðfyrisitingini er at siga, at starvsfólkamál hevur verið málsøkið undir løgmanni, og hevur fyrrverandi figgjarmálaráðharrin Karstin Hansen fleiri ferðir borið upp á mál, um at sloppið inn at kanna tey ymisku stýrini, fyri at vita hvussu fíggjarstýringin hevur verið, men hetta hevur verið honum noktað av løgmanni, landsstýrisfólkini hjá tjóðveldisflokkinum høvdu tó onki ímóti hesum.

Nú tveir mánaðir undan at val varð útskriva, fekk Fíggjarmálaráðið loksins hesið mál at umsita.

Tjóðveldisflokkurin hevur valt henda leistin, at loysa trupuleikarnar á eldraøkin, tað er møguligt, at tað kundi verið gjørt á annan hátt.

Nú kunnu fólk so sjálvi meta um kósina hjá tjóðveldisflokkinum í hesum máli.

Gott val øll somul, setið ein sterkan tjóðveldisflokk á ting.

VALGREINAR

Menning og framburð heldur enn yvirtøkur og fullveldi

Jaspur Vang
Valevni hjá Sambandsflokkinum í Suðuroy

Ynskið um at kunna gera eitthvørt betur og at vilja framburð og menning er væl vanliga orsøkin til at fremja samfelagsligar broytingar. Higartil framdar yvirtøkur av málsøkjum hava sum heild ikki tænt hesum endamálið. Heldur tykist tilætlaða endamálið við yvir- tøkunum at hava verið ein skipa ætlan um at yvirtaka fyri valdið eina. Fjøldin og væl- ferðin hava havt minni týdning.

Hyggja vit at teimum málsøkjum, sum higartil eru yvirtikin, kann sum heild staðfestast, at landspolitiskið myndugleikin ikki hevur megnað at stýra teimum størru yvirtiknu stovnunum nóg væl. Yvirtikin málsøki eru heldur ikki dagførd í nóg stóran mun.

Ein av høvuðsuppgávunum hjá einum komandi uppruddingarlandsstýri má tí verða at skúgva allar tær kostnaðar- og orkukrevjandi yvirtøkuætlanar til viks og leggja seg eftir at dagføra og menna longu yvirtikin málsøki.

Løgregla/ákæruvald, rættarskipan og flogvøllur

Fráfarnu fullveldisflokkarnir eru í alt ov stóran mun sloppnir undan at svara ítøkiligum og altavgerðandi spurningum í samband við ætlaðu yvirtøkurnar av enn fleiri málsøkjum. Eitt nú standa fylgjandi ítøkiligu spurningar ósvaraðir:

- eru núverandi løgregluog rættarskipan ov kostnaðarmiklar fyri heimastýrið ?
- hvat kemur ein yvirtøka og rakstur av løgreglu- og rættarskipan at kosta føroyska samfelagnum ?
- hvussu ætla fullveldisflokkarniar at fíggja raksturin av ætlaðu yvirtøkunum ?
- virka núverandi løgregluog rættarskipan ikki nóg væl - ella verri enn skipanir undir heimastýrinum?
- hvussu verða rættartrygd og politiskur og átrúnaðarligur habilitetur tryggjað eftir yvirtøku av løgreglu, ákæruvaldi og rættarskipan ?
- hvur heimastýrið higartil - og í nóg stóran mun - megnað at dagføra løggávu og umsiting av yvirtiknum málsøkjum ?
- eru búskaparligu fortreytirnar fyri fleiri yvirtøkum til staðar ?
- er løgfrøðiligur - og umsitingarligur førleiki til yvirtøkur og rakstur av ætlaðu yvirtøkunum sum er ?
- hvat kostar yvirtøka - og rakstur av flogvøllinum ?
- hvat kemur ein dagføring av flogvøllinum at kosta?

Sonevnda "Hvítabók" og tvær fullveldissamgongur hava ikki viðgjørt hesar ítøkiligu spurningar alment. Hóast tað vóru ætlaninar um yvirtøku av oman fyri nevndu málsøkjum komnar so væl áleiðis, áðrenn val varð útskrivað, at ætlaninar vóru klárar at seta í verk.

Heilsuverkið

Landssjúkrahúsið hevur alt tað vit minnast havt leiðslutrupuleikar. Orsøkin kann einans vera tann, at landspolitiski myndugleikin ikki hevur megnað at skapa røttu karmarnar um stovnin. Dømini um hettar eru mong, og kann m.a. nevnast, at vit í seinastuni hava hoyrt, at starvsfólki á Landssjúkra- húsinum í sínari neyð fór biddaragongd til privat vinnuvirki at savna pening inn til viðlíkahald av stovninum, eins og landsrætturin herfyri gjørdi av, at ein fyrrverandi stjóri á Landssjúkra-húsinum av óroðttum varð sagdur úr starvi og kemur landskassin tí at rinda uppsagda stjóranum stórt endurgjald. Tí kunnu vit m.a. spyrja:

- Hvørt landspolitiski myndugleikin er førur fyri at skapa røttu karmarnar um eina yvirtikna løgreglu og rættarskipan og um ein tryggan og vælvirkandi flogvøll ?

Hvat viðvíkur sjúkraviðgerð uttanlands varð á fíggjarlógini fyri 2003 alt ov lítil peningur settur av til endamálið. Hettar fyrst og fremst til stóran ampa fyri einstakað sjúklingin og harafturat ein fíggjarligur smeitur fyri sjúklingin, arbeiðsgevaran og harvið samfelagið sum heild. Eisini vóru ítøkiligar ætlanir frammi um at tillaga lóggávuna soleiðis, at enn færri føroyingar skuldu sleppa í viðgerð uttanlands.

Hvat eftirviðgerðini av sjúklingum, sum hava fingið skaða eftir heilabløðing viðvíkur, vísa kanningar, at viðgerðin í Føroyum als ikki er á sama stoði og aðrastaðni í ríkinum. Tí kunnu vit við røttum spyrja:

- Hvørt fíggjarlig orka er til yvirtøkur, tá fíggjarlig orka og førleiki annars ikki er til umsiting - og viðgerð at sjúkum føroyingum ?

Landsfyrisitingin

Propagandamaskinan hjá Tjóðveldisflokkinum, "Fregnir", visti her fyri at siga frá, at landsumsitingin ikki hevur megnað at fáa frá hondini dagliga lógarsmíðið, men leitaði sær kostnaðarmiklan serkunnleika hjá útvaldum sakførarum í Havn. Einki nýtt er í hesum. Vit onnur hava vita tað leingi.

Fráfarni landsstýrismaðurin í lógarmálum boðaði fyri stuttum alment frá, at ynskt at gera íløgur í skipanir, sum eingin veit, hvør kemur at hava ræðið á komandi árini. Soleiðis liggja partar av samfelagnum í órøkt.

Landsstýrismaðurin í almannamálum segði fyrr í ár, at eldraøkið liggur í vanrøkt. Fullveldisloysnin er at tveita kommununum ábyrgdina og útreiðslurnar.

Fólkaræðisliga skipanin óbúgvin

Í ólavsøkuroðu sínari 2003 segði fráfarandi løgmaður m.a. viðv. fullveldissamgonguni, at "persónlig áhugamál órógvaðu møguleikarnar fyri breiðum politiskum semjum" og at "politiskar neisir vóru gerandiskostur". Leggja vit harafturat dagliga klandrið og keglið innanhýsis millum teir 4 fullveldisflokkarnar, fáa vit eina greiða fatan av, hvussu búnir fullveldisflokkarnir eru fólka- ræðisliga.

- Hvussu kundi ein fullveldissamgonga, sum ikki kundi semjast "innanhýsis", fáa í lag breiðar semjur í føroyskum politikki ?

Ein landsstýrismaður í fráfarandi fullveldissamgonguni slapp gott frá at lata ein átrúnaðarligan minniluta skipa sonevndu "Siðsemisnevndina".

- Ynskja føroyingar, at ein politiskur religiøsur minniluti, ella einhvør annar minniluti, skal kunna skipa eina yvirtikna løgreglu og/ella rættarskipan og m.a. standa fyri framtíðar føroyskum lógarsmíði ?

Vit hava eftir 5 árum upplivað einar 7 landsstýrismenn í mentamálum.

- Ynskja vit, at ein yvirtikin løgregla, rættarskipan ella flogvøllur skal verða umsitin av eini 7 tilvildarligum landsstýrismonnum eftir t.d. 5 árum ?

Fullveldisbúskapur

Tað er ikki so løgi, at ein socialistiskur Tjóðveldisflokkur og ein ultra høgravendur Fólkaflokkur saman við tveimum smáum flokkum, sum onga greiða støðu hava í spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya og harvið ikki hava nakran greiðan búskaparpolitikk, ikki hava megnað at stýra føroyska búskapinum. Búskaparligu útlitini - nú búskaparliga gongdin hevur verið betur enn nakrantíð - eru hareftir:

- Undirskotið á landsfiggjarlógini 2003 verður uml. 240 mió. kr.
- Einki hevur verið gjørt fyri rækjuflotin, sum er um at fara á heysin.
- Einki ítøkiligt hevur verið gjørt fyri alivinnuna, sum er við at fara á húsagang.
- Almennu rakstrarútreiðslurnar eru eftir 5 árum øktar við uml. 1,2 mia. kr.
- Arbeiðsloysi vindur uppá seg í útjaðarøkjunum.
- Inntøkurnar hjá kommununum í útjaðaraøkjunum eru fallandi.

Samanumtikið er tað tí í evstu løtu, at veljarin fær møguleikan at gera av, hvørt hann ynskir at fullveldisgongdin skal halda áfram, ella um hann ynskir ein ábyrgdarfullan politikk innan fyri karmarnar av ríkisfelagsskapinum.

Eisini er avgerðandi neyðugt at minnast til, at í føroyskum politikki er bert ein Sambandsflokkur.

Mat til børnini í fólkaskúlanum

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins
www.lindenskov.com

Ein stórur trupulleiki í fólkaskúlanum er, at børnini ikki fáa nóg góðan mat. í Svoríki hava børnini síðani 1940'ini fingið heitan mat í døgverðatímanum. Tað tók langa tíð til at tey í Danmark skiltu, at hetta er vegurin fram. Men nú eru tað fleiri og fleiri skúlar sum bjóða børnunum mat. Um leið triðji hvør fólkaskúli í Danmark bjóðar nú børnunum mat.

Vit í Føroyum hava lítið gjørt við hesi viðurskifti, hoast onkur glotti er. Adventistaskúlin byrjaði við skúlabyrjan 2003 at geva børnum sínum sunnan mat. í Hoyvíkar skúla er ein lítlil roynd við at geva børnunum frukt og skúlabreyð. Børnini skuldu tekna seg til skipanina og gjalda eina lítla upphædd. Minst 50 børn skuldu tekna seg til skipanina fyri at hon kundi gerast veruleiki, men tá avtornaði høvdu fimm ferðir so nógv teknað seg. Børnini vóru sera glað fyri skipanina, hóast onkur gjarna hevði viljað havt ost á skúlabreyðið. Hugsið tykkum so til, um vit høvdu bjóða børnunum góðan heitan mat!

Tað er ein sannroynd, at tað er sera ymiskt, hvussu matpakkin sær út hjá børnunum. Summi hava ein flatan livursteimatpakka við, onnur fáa ein luksur matpakka við frá foreldrum, sum veruliga hava yvirskot til at taka sær væl av børnunum. Aftur onnur hava slett einki við og renna yvir í onkra kiosk at keypa sær eitt Twix ella okkurt líknandi.

Svenskar kanningar vísa sambært Politikken, at næmingarnir, sum eta døgverða klára seg væl betri enn teir, sum ikki eta nakað ella bara eta okkurt ósunt.

Hetta er so týdningarmikið mál, at bæði land, kommunur og skúlar saman við foreldrum eiga at taka málið upp til viðgerðar. Á mínari heimasíðu havi eg nakrar slóðir til Greinar um hetta evni.

Vilt tú vita meira, um hvat eg tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com. Har liggja hundrað tals greinar, ræður o.a. frá hesum tíðarskeiði.